# Blákrossheimið




# Ársfrágreiðing 2018

# Innihald

**Um stovnin** **3**
*Nevndin* *3*
*Starvsfólk* *3*
*Játtan* *4*
*Rakstur* *4*
*Samstarv* *4*
*Bíðilisti* *5*

**Ástøði í heildarviðgerðini** **5**

**Hagtøl** **6**
*Viðgerð – býtt eftir slagi* *6*
*Viðgerð - býtt eftir aldri* *7*
*Ung í viðgerð* *8*
*DAT Ung – viðgerðartilboð fyri 15-18 ára gomul.* *9*
*Viðgerð - býtt eftir kyni* *9*
*Viðgerð - býtt eftir hvussu ofta fólk hava verið í viðgerð* *10*
*Familjuviðgerð* *11*
*Ymisk hagtøl frá Blákrossheiminum* *12*

**Framtíðarútlit** **13**

## Um stovnin

Blákrossheimið varð sett á stovn av Bláa Krossi Føroya í 1984. Pláss var fyri fimm búfólkum. Virksemið varð víðkað til 15 búfólk í 1987. Føroya Landsstýri hevur stuðlað rakstrinum øll árini. Frá og við 2003 varð hetta broytt til, at Landsstýrið letur játtan á fíggjarlógini til rakstur av Blákrossheiminum. Í sambandi við umleggingar av viðgerðini hevur Blákrossheimið í dag 12 búpláss, umframt ambulanta viðgerð. Í september 2014 varð virksemið hjá Blákrossheiminum flutt úr Tórshavn inn á Nes í Eysturoy.

## Nevndin

Leiðslan á Blákrossheiminum er skipað við nevnd og einum leiðara. Í nevndini sita:

- Hjalmar Hansen, stjóri, formaður
- Álvur Højgaard stjóri, umboð fyri Bláa Kross Føroya, næstformaður
- Asta Marjunardóttir, eindarleiðari, skrivari

- Jütta J. Olsen er leiðari

## Starvsfólk

Á Blákrossheiminum eru tilsaman 12,5 ársverk, og av hesum eru 3 ársverk í DAT-Ung.

Á Blákrossheiminum kunnu starvsfólkini í høvuðsheitum bólkast soleiðis:

- leiðari
- deildarsjúkrarøktarfrøðingur
- sálarfrøðingur
- sálarviðgeri
- rúsevniráðgevari
- familjuráðgevari
- og onnur starvsfólk

Eisini eru lækni og prestur fast knýttir at viðgerðini, men eru hesir ikki taldir við í uppgerðini av fulltíðarstarvsfólkum.

## Játtan

Á fíggjarlógini fyri 2018 var rakstrarjáttanin hjá Blákrossheiminum tkr. 8.554, sum eru tkr. 1.800 hægri enn í 2017. Av hesum eru tkr. 144 markaðar til sáttmálabundna lønarhækking á Blákrossheimium, og hin parturin er markaður til DAT-Ung. Raksturin av Blákrossheiminum í 2018 var tkr. 8.547, sum er tkr. 7 lægri enn játtaða upphæddin á fíggjarlógini fyri 2018. Hóast lønarútreiðslurnar hjá Blákrossheiminum og DAT-Ung eru hægri í 2018 vegna broyttar, sáttmálabundnar lønaravtalur, hava vit megnað at leggja arbeiðið til rættis innanfyri játtanina. Samanberingin við 2017 skal eisini síggjast í tí samanhanginum, at í 2017 byrjaði virksemið í DAT-Ung ikki fyrr enn í seinna hálvári.

Á fíggjarlógini fyri 2018 var bert ein partur av játtanini til DAT-Ung, men í apríl/mai 2018 kom ein eykajáttan, sum gjørdi, at vit kundu byrja fult virksemi í DAT-Ung í seinna hálvári 2018.

## Rakstur

Játtanin til Blákrossheimið er økt við tkr. 144 í 2018. Hetta var ætlað til sáttmálabundnu lønarhækkingarnar. Játtanin til DAT-Ung er økt í 2018, og hetta gav nýggjar møguleikar at byggja víðari á tað virksemið, sum byrjaði varðliga á heysti 2017. Í apríl/mai 2018 bleiv staðfest, at DAT-Ung fekk eina eykajáttan, og í seinna hálvári 2018 bar til at seta fólk í fast starv. Av tí sama er lønarparturin av samlaðu nýtsluni í 2018 lægri enn undanfarin ár.

| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lønir** | 68% | 71% | 71% | 76% | 66% |
| **Aðrar. útr.** | 32% | 29% | 29% | 24% | 34% |

## Samstarv

Blákrossheimið hevur eitt gott og umfatandi samstarv við partar, sum á ymiskum økjum hava við brúkararnar at gera. Her er talan um samstarv við psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum og kriminalforsorgina í sambandi við dómar, tá fólk blíva dømd í viðgerð og/ella at halda seg edrú, ella sjálvi ynskja at koma í viðgerð Eisini bjóðar Blákrossheimið viðgerð til fólk í Varðhaldinum í Mjørkadali. Fram til 2012 vóru okkara starvsfólk í hølunum hjá Varðhaldinum, men síðani 2013 hava fólk frá Varðhaldinum í staðin verið í viðgerð á Blákrossheiminum, og er hetta ein partur av dómstíðini. Aðrir samstarvspartar eru Heilbrigdið á Velbastað og Frælsið á Eiði, sum vit samstarva við, fyri at so nógv sum gjørligt fáa pláss í viðgerð árliga. Vit samstarva eisini við kommunalar- og sosialar myndugleikar, tá talan er um barnaverndarmál. Viðmerkjast skal, at samstarvið við

barnaverndirnar kring landið er økt tey seinnu árini. Síðani vit byrjaðu viðgerðina við tilboðnum DAT-Ung er samstarvið við barnaverndirnar økt, tí brúkararnir eru undir 18 ár, og eru ofta eisini kendir í ymisku barnaverndunum kring landið.

### Bíðilisti

Alt 2018 hava vit havt bíðilista fyri fólk, sum ynskja at koma í viðgerð. Fólk fáa eitt tilboð so skjótt sum gjørligt. Tey verða biðin um at koma til eina metanarsamtalu, so vit betur saman við teimum síggja, hvør tørvurin er. Tey, sum ikki hava verið í viðgerð hjá okkum áður, hava frammihjárætt at koma inn, men vit taka eisini fólk inn í avrúsing, tá pláss er. Síðan vit í 2012 byrjaðu at bjóða 2 ára viðgerðartilgongd, sum er skipað sum inni og útviðgerð, er avtalan, at brúkarar, sum hava verið inni í 6 vikur intensivari viðgerð, ikki koma innaftur, fyrr enn 2 ára viðgerðartilgongdin er liðug. Tó kann ein brúkari hetta tíðarskeiðið koma til avrúsing um neyðugt, fyri síðani at halda áfram við útiviðgerðini.

## Ástøði í heildarviðgerðini

Heildarviðgerðin á Blákrossheiminum byggir á prógvað ástøði. Grundhugsanin um broyting er frá sálarfrøðingunum Prochaska og DiClementa (2008). Teirra ástøðið um Varandi Broyting byggir á positiva hugsan um, at broyting er møgulig. Í heildarviðgerðini verður ástøði hjá Rollnick og Miller (2009) um motiverandi samrøður (MI) nýtt. MI er ein arbeiðsháttur, har viðgeri og brúkari arbeiða saman um at kanna og loysa ambivalens hjá brúkaranum. Eisini verður ástøðið hjá Antonovsky, (2000) um Uppliving av Samanhangi (UaS) brúkt. UaS byggir á eina positiva hugsan um, hví ein er raskur/frískur.

Tað nýggjasta ástøðið, sum verður brúkt í viðgerðini, verður nevnt DAT, ið er stytting fyri Dialektisk Atferðar Terapi. Byrjað varð við hesum á Blákrossheiminum í september 2016. Innihaldið í DAT er, at dentur verður lagdur á, at góðtaka veruleikan, sum hann er, og samstundis at arbeiða við at taka ábyrgd og broyta tað, sum vit kunnu. Eisini verður arbeitt við at menna ymiskar førleikar. Viðgerðin á Blákrossheiminum er skipað sum inni- og útiviðgerð. Sí útgreining í myndini niðanfyri.

# 2 ára viðgerðartilboðið á Blákrossheiminum




# Onnur tilboð




## Hagtøl

### Viðgerð – býtt eftir slagi

Tá talan eru um hvat slag av rúsandi evnum fólk gerast bundin av, er broyting farin fram tey seinastu árini. Tó er alkohol framvegis nógv tann størsti trupulleikin. Okkara tøl vísa, at fólk, sum eru bundin at ymiskum rúsandi evnum, eisini eru bundin at alkoholi. 75% av teimum, sum vóru í viðgerð í 2018, høvdu trupulleikar av alkoholi, samanborið við 73% í 2017. Í 2018 eru 25% sum umboða tey, sum brúktu alkohol saman við øðrum rúsevnum. Í 2017 var hetta talið 27%.

Bundni av alkoholi og tablettum hevur verið svingandi seinastu árini. Í 2018 vóru 6% av viðgerðunum fyri hetta slagið av bundni, og var tað 8% í 2017. Í bólkinum, sum nýtir bæði alkohol, tablettir, hash og narkotisk evni í senn, var lutfallið í 2018 12% og tað sama í 2017.




Royndir frá innleggingum á Blákrossheiminum vísa, at næstan eingin ”bara” nýtir t.d. hash, amfetamin ella onnur narkotisk evnir í Føroyum. Hetta, at næstan eingin heldur seg til eitt einstakt rúsevni, kann hugsast at vera eitt serføroyskt fyribrigdi, og kann vera orsakað av avmarkaðari og óstøðugari atgongd til ymisku rúsevnini.

Á Blákrossheiminum hava vit sæð eina gongd, sum tykist at hava stabiliserað seg, har ein støðugur partur av viðgerðunum eru fyri misnýtslu av hashi og/ella narkotiskum evnum saman við alkoholi og tablettum. Henda gongd eigur at verða tikin í størsta álvara.

## Viðgerð - býtt eftir aldri

Tey flestu, sum leita sær hjálp hjá okkum fyri bundni í 2018, eru í aldrinum 30-59 ár. Hetta skiftir millum aldursbólkin 30-49 og 40-59 ár, og hevur hetta verið soleiðis nógv tey seinastu árini. Aldursbólkurin 30-59 ár umboðar í 2018 uml. 69% av øllum brúkarunum samanborið við 77% í 2017. Í 2018 var ein øking í yngsta aldursbólkinum 15-20 ár, tí vit gjøgnum DAT-Ung tilboðið hava fingið fleiri ung í viðgerð. Miðalaldurin á teimum, sum vóru í viðgerð í 2018, var 45 ár, sum er 2 ár lægri enn undanfarna ár. Hetta er tí, at fleiri ung eru í viðgerð nú.




## Ung í viðgerð

Í 2018 vóru 13 persónar undir 20 ár í viðgerð, samanborið við ein persón í 2017. Í aldrinum 20-29 vóru 20 persónar í viðgerð í 2018, í 2017 var talan um 7 persónar. Vøksturin stavar frá tilboðnum, sum vit veita gjøgnum DAT-Ung, sum er eitt sertilboð til tey ungu.

Tey ungu nýta í størri mun annað enn alkohol sum t.d. hash, amfetamin, kokain, heroin og onnur narkotisk evni saman við rúsdrekka. Hetta krevur serstaka viðgerð og vitan, og tekur longri tíð at viðgerða, og hesa viðgerð veita vit í DAT-Ung.

Í samband við børn og ung, sum vaksa upp í umhvørvi, har rúsdrekka og rúsevni eru ein partur av gerandisdegnum, hava vit seinastu árini víst til fyribyrgingararbeiðið hjá Bláa Krossi Føroya. Tey skipa fyri sjálvhjálparbólkum undir heitinum “Øll hava rætt til góð barnaár”.

## DAT Ung – viðgerðartilboð fyri 15-18 ára gomul.

Stórur partur av arbeiðinum hevur higartil verið at koma í samband við tey ungu, familjur teirra og tey, sum veita ymiska hjálp í teirra nærumhvørvi. Vit hava verið á nógvum vitjanum. Á fundum og við framløgum hava vit kunnað um okkara nýggja viðgerðartilboð.

Millum stovnar og myndugleikar, sum vit hava vitjað, kunnu vit nevna Barnaverndarstovuna, Fólkaheilsuráðið, SSP-samstarvið, ymiskar barnaverndartænastur, í ungdómshúsum, hjá heilsumynduleikum, fólkaskúlaum, miðnámsskúlum o.s.fr. Hetta arbeiðið fer at halda áfram í 2019.

Í 2018 hava 13 ung fingið – og fáa framvegis – DAT-viðgerð, sum inniber einstakligalingasamrøður, samrøður við familjur/avvarandi hjá teimum ungu og bólkaviðgerð.

## Viðgerð - býtt eftir kyni

Býtið millum kynini vísir, at størsti parturin av teimum, ið leita sær hjálp á Blákrossheiminum, eru menn. Hyggja vit at tølunum fyri øll tey, ið hava verið í samband við stovnin, bæði í inni- og útiviðgerð, síggja vit, at í 2018 vóru 78% menn og í 2017 var hetta talið 77%.



## Viðgerð - býtt eftir hvussu ofta fólk hava verið í viðgerð

Tá ið alt er tikið við, eru 202 fólk skrásett at hava fingið viðgerð í 2018, samanborið við 196 fólk í 2017. Av hesum 202 vóru 97 (2017: 75) persónar í samtaluútiviðgerð, og 26 (2017: 19) persónar í viðgerð sum avvarðandi í samtaluútiviðgerð. Innleggingarnar vóru 106 í 2018 (2017: 102).

Miðaltalið fyri, hvussu nógv fólk vóru inni pr. dag í 2018 var 10 fólk (2017: 10). Í miðal hava fólk verið innløgd í 33 dagar í 2018, sum er tað sama sum í 2017.

Sæð út frá, at intensiva viðgerðin er 42 dagar, so samsvarar tað við, at fólk sjálvdan fara út í úrtíð, men eru til viðgerðin er komin at enda. Eftir lidna viðgerð, verða øll boðin at halda áfram í 2 ára skipaðu útiviðgerðini.

Seinastu árini hava vit boðið teimum, sum áður hava verið í fullari viðgerð, men sum hava brúk fyri avrúsing, at koma í avrúsing og síðani halda fram í 2 ára skipaðu útiviðgerðini. Tað ger so, at fleiri koma bert inn til avrúsing, sum varðar í 7-10 dagar. Í sambandi við, hvussu ofta fólk koma í viðgerð, vísa hagtølini, at í 2018 komu 74% (2017: 86%) bara einaferð í viðgerð.



## Familjuviðgerð

Royndirnar vísa, at tað er sera týdningarmikið at taka familjuna við í viðgerðina fyri misnýtslu av rúsandi evnum, tí tá eru vit við til at broyta neiliga familjustrukturin, og harvið geva vit uppvaksandi ættarliðinum betri kor. Tí hava vit, síðani 2016 lagt okkum miðvíst eftir, at fáa samband við allar familjulimirnar í einum húski, tá ið fólk venda sær til okkara.

Í 2018 er viðgerðin broytt soleiðis, at familjulimir vikuliga koma inn til samtalu, saman við teimum, sum eru í viðgerð.

Blákrossheimið hevur ein familjuráðgeva, sum hevur ábyrgdina av at skipa familjuviðgerðina. Í 2018 hava vit havt tvey familjuskeið, ið tilsamans taka 6 dagar hvørt. Hetta er ein partur av okkara staðfesting av, at rúsmisnýtsla ávirkar alt húskið. 29 luttakarar tóku av hesum tilboðnum í 2018 samanborið við 22 í 2017.

Familjuviðgerðin er útgreinað á hesari leinkjuni á okkara heimasíðu:
https://www.blakrossheimid.fo/rusvidgerd/familjuvidgerd/

## Ymisk hagtøl frá Blákrossheiminum

| Heiti | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av fólki í viðgerð* | 155 | 175 | 186 | 196 | 202 |
| Ymisk fólk í rúsviðgerð | 112 | 141 | 138 | 149 | 170 |
| Tal av innleggingum | 109 | 127 | 133 | 102 | 106 |
| Nýggj fólk í rúsviðgerð | 39 | 32 | 44 | 69 | 149 |
| Tal av fólki í útiviðgerð | 40 | 34 | 47 | 75 | 76 |
| Tal av familjulimum í útiviðgerð | 6 | 14 | 6 | 19 | 26 |
| Røktardagar í alt, inni | 3.315 | 3.574 | 3.017 | 3.346 | 3.227 |
| Røktardagar miðal pr. fólk, inni | 30 | 28 | 23 | 33 | 33 |
| Miðal búfólk pr. dag | 11 | 11 | 9 | 10 | 10 |
| Røktardagar í alt, úti** | | | 18.361 | 22.453 | 25.701 |
| Menn | 80% | 80% | 86% | 77% | 78% |
| Kvinnur | 20% | 20% | 14% | 23% | 22% |
| Miðalaldur | 47 ár | 49 ár | 48 ár | 47ár | 45 ár |
| Luttakarar á familjuskeiði | 15 | 23 | 13 | 22 | 29 |

* *Hetta talið er ein samanteljing av "Tal av innleggingum" + "Tal av fólki í útiviðgerð" + "Tal av familjulimum í útiviðgerð"*

** *Í 2014 broyttu vit eftirviðgerðina til útiviðiðgerð í 2 ár. Frá 2016 eru hesi hagtølini tikin við soleiðis, at vit síggja, hvussu nógvir røktardagar eru uttanfyri húsið, og fyri tey flestu fólkini er galdandi, at vit hava samband við tey í miðal 2 ferðir um vikuna, har annar dagurin er inni, og hin er gjøgnum samtalur úti, telefonsamtalur o.a. samskifti*

## Framtíðarútlit

Tilboðið til ung í aldrinum 15-18 ár byrjaði í 2017, tá játtanin var tkr. 800. Í 2018 var játtanin tkr. 2.450 og í 2019 er játtanin tkr. 2.400. Vit fara við hesari játtan í 2019 at arbeiða fyri framhaldandi menning, so tilboðið kemur at virka so væl sum gjørligt fyri tey ungu og foreldur teirra.
Framhaldandi fara vit eisini at arbeiða fyri at gera tilboðið enn meira kent og varðveita góða samstarvið, sum vit hava við tey, sum vara av teimum ungu. Vit hava gjørt eina neyva lýsing av viðgerðini, sum kann síggjast her: https://www.datung.fo . DAT-Ung tilboðið er staðsett í Tórshavn undir leiðslu av Blákrossheiminum.

Vanliga virksemið á Blákrossheiminum verður alla tíðina ment, og vit hava tey seinastu árini skipað fyri familjuskeiðum og ambulantum samtalum.
Tvær ferðir árliga hava vit familjuskeið fyri avvarandi hjá teimum, sum hava trupulleikar við rúsandi evnum. Skeiðini vera hildin í Tórshavn og Runavík.
Í 2018 hava vit miðvíst arbeitt enn meira við familjuviðgerð á tann hátt, at familjan hjá teimum, sum eru í viðgerð, koma inn til vikuligar samtalur saman við teimum, sum eru í viðgerð.

Vanliga virksemið á Blákrossheiminum verður alla tíðina ment, har vit brúka nýggjastu vitan og gransking innan misnýtsluviðgerð soleiðis, at viðgerðin altíð verður hildin á einum fakliga høgum støði til frama fyri brúkaran.

Vinarliga og við vón um framhaldandi gott samstarv.

á Nesi, 5. apríl 2019.

**Jütta J. Olsen**
leiðari